# Løgmansskrivstovan

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 8. september 2020 |
| Mál nr.: | 0626-091/19 |
| Málsviðgjørt: | KTH |
| Eftirkannað: | 13. mars 2020 |

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vápn v.m.**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vápn v.m.**
(Reglur um útflutning av vápnum og um atgongd til vápnaskránna)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 43 frá 22. mai 1969 um vápn v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 12. mai 1980 og løgtingslóg nr. 81 frá 22. mai 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:
“Løgtingslóg um vápn o.a.”

**2.** Í § 1, stk. 3 verður “evna til” broytt til: “flyta út”.

**3.** Í § 2, stk. 1 verður “§ 1” broytt til: “§ 1, stk. 1”.

**4.** Í § 3 a, stk. 1 verður aftan á “at flyta inn,” sett: “flyta út,”.

**5.** Í § 4, stk. 1 verður aftan á “reglur um” sett: “loyvi,”.

**6.** Í § 4, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
“Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til upplýsingarnar, sum eru skrásettar sambært 1. pkt.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um vápn vm. var til ummælis á vári 2019. Í uppskotinum varð lagt upp til at skilja myndugleikauppgávuna at geva útflutningsloyvi til vápn sundur, so at uppgávan frameftir varð deild millum politiið og Umhvørvisstovuna alt eftir hvørji vápn, talan var um.

Í sambandi við, at uppskotið var til ummælis, hevur spurningur stungið seg upp, um heimild er í vápnalógini at krevja loyvi í sambandi við útflutning av vápnum, sum eru fevnd av lógini.

Av tí, at heimildin at geva útflutningsloyvi ikki er greið, er lagt upp til at broyta vápnalógina á hesum øki. Samstundis er metingin, at tað er neyðugt, at landsstýrismaðurin fær møguleika at áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til vápnaskránna.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*Útflutningur av vápnum*
Ásetingin í § 1, stk. 2 í kunngerðini um vápn vm. frá 1969 ljóðar soleiðis:

> *"Stk. 2.* Umsókn um loyvi at flyta inn, útvega sær, hava vápn ella ganga við vápni sum tilskilað í § 1, stk. 2 og loyvi til gerð og útflutning av vápnum sum tilskilað í § 1, stk. 3 og tilfari til verður at senda landfútanum gjøgnum sýslumannin ella løgregluna [...]. Tó er landfútanum heimilt at geva loyvi til útflutnings av handvápnum til skotkappingar og veiðuvápn og lóður í hóskandi nøgdum til nýtslu undir fyribils tilhaldi uttanlands."

§ 1, stk. 2 í kunngerðini vísir til § 1, stk. 2 og § 1, stk. 3 í vápnalógini, sbrt. løgtingslóg um vápn vm., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 81 frá 22. mai 2015.

§ 1, stk. 3 í vápnalógini er orðað soleiðis:

> *"Stk. 3.* Tað er forboðið uttan loyvi frá landsstýrinum at gera ella evna til amboð og tilfar sum tilskilað í stk. 1 og 2. [...]."

§ 1, stk. 3 í vápnalógini snýr seg sostatt ikki um útflutning av vápnum, sum ásetingin í § 1, stk. 2 í kunngerðini gevur fatanina av. Útflutningur er heldur ikki umrøddur aðrastaðni í lógini.

Vápnalógin er frá 1969 og upprunauppskotið er tí eisini á donskum. § 1, stk. 3 í danska tvítekstinum ljóðar soleiðis:

> "*Stk. 3.* Det er forbudt uden tilladelse fra Færøernes landsstyre at tilvirke og udføre de i stk. 1 og 2 nævnte genstande og stoffer. [...]."

Havandi í huga kunngerðina um vápn frá 1969, sum fekk gildi stutt eftir, at lógin varð samtykt í Løgtinginum, og sum inniheldur reglur um útflutning, man lítil ivi vera um, at orðingin í § 1, stk. 3 í føroyska upprunatekstinum er skeivur, og at *evna til* átti at verið *flyta út*.

*Udføre,* sum kann merkja bæði at evna til og at flyta út, verður brúkt í danskari vápnalóggávu í týdninginum *flyta út*.

Danski tvíteksturin av vápnalógini varð settur úr gildi í sambandi við broyting av vápnalógini í 2015.

Síðan løgtingslógin og kunngerðin komu í gildi í 1969 hevur verið kravt loyvi til útflutning av vápnum. Eftir at Løgmansskrivstovan er gjørd varug við, at heimildin at áseta nærri reglur um útflutning ikki longur er í lógini, hevur Løgmansskrivstovan kunnað Umhvørvisstovuna um støðuna og hevur heitt á Umhvørvisstovuna um heldur at geva váttanir um, at útflutningur kann fara fram.

*Atgongd til vápnaskránna*
Sambært § 4, stk. 1 í vápnalógini ásetur landsstýrismaðurin í kunngerð reglur um fráboðan og skráseting av teimum lutum og tilfari, sum koma undir §§ 1 og 2 í vápnalógini.

Í § 2 í kunngerð nr. 74 frá 28. juni 2016 um skráseting av skotvápnum er ásett, at skotvápn fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 1, nr. 1 í vápnalógini skulu skrásetast í eini vápnaskrá, sum Umhvørvisstovan situr fyri.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er í fyrsta lagi, at tað aftur fæst heilt greið heimild at krevja loyvi í sambandi við útflutning av vápnum, sum eru fevnd av vápnalógini.

Tað er týdningarmikið at hava reglur um útflutning av vápnum. Hetta er fyrst og fremst tí, at tað er av týdningi fyri trygd o.a., at tað er greitt, hvør flytur vápn út og nær. Samstundis er Løgmansskrivstovan kunnug við, at tá skjúttar skulu av landinum við teirra vápni, aloftast til kappingar, lættir tað um innflutning í onnur lond, um viðkomandi kann vísa á, at vápnið lógliga er flutt úr Føroyum.

Tá tað verður skotið upp at hava reglur um útflutning av vápnum, fevnir hetta um allan flutning av vápnum úr Føroyum, t.e. bæði tíðaravmarkaðan útflutning, t.d. til eina kapping, og tíðaróavmarkaðan útflutning, t.d. í sambandi við sølu.

Tá lógarheimildin er fingin í lag, ætlar Løgmansskrivstovan at gera broyting í kunngerð um vápn v.m., sum eisini var ætlanin á vári 2019. Hetta fyri at gera greitt, hvussu uppgávubýtið á økinum skal verða.

Samstundis ætlar Løgmansskrivstovan at áseta í kunngerð um vápn v.m., at Umhvørvisstovan undir nærri treytum kann geva (serlig) útflutningsloyvi til vápn fevnd av § 2, stk. 1, nr. 1 í vápnalógini, sum hava eina longri gildistíð, t.d. 1 ár, um talan er um útflutning til skotkappingar, ítróttalegur, veiðu ella líknandi. Øll útflutningsloyvi skulu sjálvsagt verða treytað av, at viðkomandi, sum ynskir at flyta út vápn, hevur eitt galdandi vápnaprógv.

Orsøkin til hesa ætlaðu broyting í kunngerðini er, at m.a. Skjótisamband Føroya áhaldandi hevur víst á tørvin hjá føroyingum, sum ferðast við vápnum til kappingar o.a. í útlondum, at hava eitt sokallað vápnapass, sum ger ferðing lættari. Útflutningsloyvi, við longri gildistíð enn tann einstaki uttanlandsstúrurin, lættir um umsitingarliga hjá bæði skjúttum og myndugleika.

Lógaruppskotið ger tað møguligt at áseta reglur um eitt føroyskt vápnapass, sum svara til reglurnar um ES-vápnapass, sum eru galdandi í ES-limalondunum.

Í øðrum lagi er endamálið við lógaruppskotinum, at landsstýrismaðurin fær greiða heimild at áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til vápnaskránna.

Tá henda heimild er fingin til vegar er ætlanin, at politiið í kunngerð fær beinleiðis atgongd til vápnaskránna. Orsøkin er, at tað t.d. av trygdarávum kann vera umráðandi hjá politinum at sláa upp í vápnaskránni t.d. í sambandi við fyribyrging og eftirkanning av lógarbrotum.

Lógaruppskotið og kunngerðin, sum verður givin við heimild í lógini, heimilar, at landsstýrismaðurin kann geva t.d. politinum atgongd til vápnaskránna. Lógaruppskotið – ella kunngerðin – viðger ikki, nær t.d. politiið kann sláa upp í skránni, og hvørjar trygdarfyriskipanir skulu verða uppá pláss fyri at ein sovorðin atgongd kann verða heimilað. Hetta er regulerað í aðrari lóggávu, undir hesum dátuverndarlóggávu, sum m.a. setur strong krøv um trygd í sambandi við viðgerð.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Lagt er upp til broytingar, sum gera tað heilt greitt, at tað krevur loyvi, tá vápn, sum eru fevnd av vápnalógini, skulu útflytast.

Eisini er lagt upp til, at landsstýrismaðurin fær heimild at áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til vápnaskránna.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið hevur í tíðarskeiðnum 29. januar 2020 til 28. februar 2020 verið til ummælis hjá Bóndafelag Føroya, Búnaðarstovuni, Dátueftirlitinum, Djóralæknastovuni, Djóralæknatænastuni, Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Kærustovni, Føroya Landfúta, Føroya Politistafelag, Havbúnaðarfelagnum, ÍSF, P/F Jógvan Weihe, Kommunufelagnum, MBM, Sands Skjótifelag, Skjótisambandi Føroya, Sunda Byrsufelag, TAKS, Trygd, Betri Trygging, Veiðifelagnum Byrsumúla, Veiðifelag Føroya, Vestmanna Byrsufelag, Vinnuhúsinum, Umhvørvisstovuni, Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Almannamálaráðnum og Heilsumálaráðnum.

Uppskotið hevur harumframt ligið alment frammi á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri.

Búnaðarstovan, Dátueftirlitið, Føroya Kærustovnur, Føroya Landfúti, Føroya Politistafelag, Skjótisambandi Føroya, Sunda Byrsufelag, Betri, Veiði- og Skjótifelag Føroya, Uttanríkis- og mentamálaráðið, Fiskimálaráðið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið hava sent Løgmansskrivstovuni ummælisskriv.

**Búnaðarstovan**, **Føroya Kærustovnur**, **Betri**, **Uttanríkis- og mentamálaráðið**, **Fiskimálaráðið**, **Umhvørvis- og vinnumálaráðið**, **Almannamálaráðið** og **Heilsumálaráðið** hava ongar viðmerkingar til uppskotið.

***Dátueftirlitið*** ger vart við, at beinleiðis atgongd til eina skipan økir um váðan fyri trygdarbroti, og mælir til, at atgongdin hjá politinum verður nágreinað. Dátueftirlitið mælir eisini til, at nøktandi trygdartiltøk verða sett í verk, og at hesi verða skjalfest. Dátueftirlitið vísir eisini á, at lógin um viðgerð av persónupplýsingum einans er galdandi fyri almennar dátuábyrgdarar, sum eru undir myndugleika heimastýrisins.

*Løgmansskrivstovan skal viðmerkja, at lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til upplýsingar, sum eru skrásettar í vápnaskránni. Eftir ætlan skal Føroya Politi fáa slíka atgongd. Fær politiið – ella annar myndugleiki – atgongd til vápnaskránna, skal henda atgongdin og tann viðgerðin av persónupplýsingum, sum fer fram, lúka tær treytir, sum eru í persónupplýsingarlógini. Tað merkir m.a. at meginreglurnar fyri viðgerð av persónupplýsingum skulu verða loknar, og at tann, sum slær upp í vápnaskránni skal hava eina viðgerðarheimild.*

*Fjaratgongd til vápnaskránna – og aðrar skráir – skal altíð innrættast á ein tryggan hátt, og skal m.a. lúka treytirnar í persónsupplýsingarlóggávuni. Nýggja dátuverndarlógin, sum kemur í gildi 1. januar 2021, og sum alment hækkar verndarstøðið hjá skrásettum í Føroyum, setur høg krøv til dátuverndina, og tað trygdarstøðið, sum skal vera um eina fjaratgongd, sum lagt er upp til í hesum lógaruppskoti. Krøvini, sum fylgja av dátuverndarlóggávuni eru m.a. teknisk krøv til trygdina við atgongdini, men eisini bygnaðarlig tiltøk, undir hesum hvør, sum hevur atgongd til skipanina, og hvørjar upplýsingar, tey fáa atgongd til. At vanligu reglurnar í dátuverndarlóggávu skulu vera loknar, er nágreinað undir pkt. 1.3 í almennu viðmerkingunum og í serligu viðmerkingunum til § 1, nr. 6.*

*Føroya Politi er sum ríkismyndugleiki í Føroyum ikki fevnt av føroyskari lóggávu um viðgerð av persónupplýsingum. Fyri Føroya Politi er tó anordning nr. 754 av 19. juni 2017 om ikrafttræden af lov om behandling af personoplysninger for rigsmyndighedernes behandling af oplysninger på Færøerne galdandi. Tað er sjálvsagt, at Føroya Politi skal fylgja hesum reglum. Føroya Politi er undir eftirliti av danska Dátueftirlitinum.*

***Føroya Landfúti*** hevur ikki ítøkiligar viðmerkingar til uppskotið, men viðmerkir alment, at Landfútin tekur undir við uppskotinum, og er serliga nøgdur við, at Føroya Politi er nevnt í viðmerkinginum til § 1, nr. 4 (*nú nr. 6*) um beinleiðis atgongd til vápnaskránna.

***Føroya Polistafelag*** hevur ongar viðmerkingar til ætlaðu broytingarnar. Felagið ger tó vart við onnur viðurskifti í vápnalógini, sum áttu at verið broytt. Politistafelagið vísir á, at reglurnar um knívar áttu at verið strangari, at *tasarar* (t.e. streympistóli) áttu at verið ólógligar, at støddin á høglum í § 2, stk. 1, nr. 1 skal verða sett til 4 mm, og at kaliberstøddin á luftbyrsum í § 2, stk. 1, nr. 1 og nr. 2 skal verða broytt frá 5,5 mm til 4,5 mm.

*Løgmansskrivstovan er varug við, at tað eru ásetingar í vápnalógini, sum tað kundi verið hugt nærri at til tess at tryggja, at vápnalógin er nútíðarhóskandi. Løgmansskrivstovan er tó av teirri fatan, at broytingarnar, sum eru í hesum lógaruppskoti, ikki eiga at bíða eftir eini meira umfatandi dagføring av vápnalógini.*

***Skjótisamband Føroya*** fegnast um, at tað verða tikin stig til at gera tað léttari hjá skjúttum at ferðast við vápnum til kappingar og venjingarlegur. Skjótisamband Føroya vísir tó á, at tað hevði verið ynskiligt, at føroyskir skjúttar kundu fingið ES-vápnapass. Skjótisamband Føroya hevur í ummælisskrivinum lagt við uppskot til, hvussu eitt føroyskt vápnapass kann síggja út.

Skjótisamband Føroya vísir eisini á, at Løgmansskrivstovan eigur at gera tað meira greitt í uppskotinum, at orðingin "flyta út" fevnir um bæði "útflutning" og at "ferðast við". Samstundis vísir sambandið á, at tað eigur at vera eitt krav fyri at ferðast uttanlands við vápnum, at skjúttin hevur staðið vápnatrygdarskeið, meðan hetta ikki nýtist at verða krav, um vápnið skal flytast úr Føroyum í sambandi við sølu.

*Løgmansskrivstovan er kunnug við sjónarmiðið hjá Skjótisambandi Føroya um møguleikan at fáa ES-vápnapass og er sinnað at arbeiða fyri, at hetta skal gerast møguligt.*

*Orðingin "flyta út" fevnir um allar støður, har eitt vápn verður flutt út úr Føroyum óansæð um hetta er tíðaravmarkað, t.d. til eina kapping, ella tíðaróavmarkað, t.d. í sambandi við sølu. Týdningurin er nágreinaður í pkt. 1.3. í almennu viðmerkingunum omanfyri og í serligu viðmerkingunum til § 1, nr. 2.*

*Løgmansskrivstovan hevur valt ikki at fylgja uppskotinum um at seta krav um, at einans persónar, sum hava vápnaprógv við vápnatrygdarskeiði kunnu flyta vápn út.*

*Uppskotið til vápnapass frá Skjótisambandi Føroya verður tikið við í arbeiðið, tá reglurnar skulu fremjast í verki.*

**Sunda Byrsufelag** tekur undir við uppskotinum. **Veiði- og Skjótifelag Føroya** tekur eisini undir við uppskotinum, men vísir á, at tað eigur at ganga meira klárt fram av uppskotinum, at tað eisini skal bera til at ferðast við vápnapassi sum veiðumaður. Felagið ger eisini vart við, at felagið hevur gjørt uppskot til nýggja vápnalóg í 2016, sum felagið fegin vil koma á fund við Løgmansskrivstovuna um.

*Løgmansskrivstovan hevur tillagað almennu viðmerkingarnar undir pkt. 1.3 í samsvari við viðmerkingarnar hjá Veiði- og Skjótifelag Føroya. Tað skal tó viðmerkjast, at reglurnar um vápnapass ikki verða ásettar í lógaruppskotinum, men í kunngerð við heimild í lógini, sum verður samtykt. Kunngerðin verður send til ummælis.*

*Løgmansskrivstovan er altíð sinnað at tosa við partar, sum hava áhuga í lóggávu, sum Løgmansskrivstovan umsitur.*

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Umhvørvisstovan hevur áður givið loyvi, og váttar í dag eftir umsókn, at ein persónur kann flyta út vápn, og hevur uppskotið tí ikki við sær fíggjarligar avleiðingar.

Tað verður mett, at tað fer at kosta umleið 10.000 kr. (tekniskt) at fáa beinleiðis atgongd til vápnaskránna. Hesa útreiðslu skal myndugleikin, sum fær atgongd til skránna, gjalda.

Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Umhvørvisstovan hevur áður givið loyvi, og váttar í dag eftir umsókn, at ein persónur kann flyta út vápn. Mett verður, at tað kann hava við sær ein umsitingarligan lætta, tá kunngerð um vápn v.m. verður broytt, soleiðis at tað verður møguligt hjá Umhvørvisstovuni at veita loyvi til útflutnings, sum hava eina longri gildistíð.

At t.d. politiið fær beinleiðis atgongd til vápnaskránna kann eisini lætta um umsitingina á Umhvørvisstovuni.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Viðmerkjast skal tó, at tá lógaruppskotið er samtykt, ætlar Løgmansskrivsstovan í kunngerð at áseta, at tað verður møguligt hjá persónum, sum ferðast uttanlands til kappingar o.a. við vápnum, undir ávísum treytum kunnu fáa loyvi, sum hevur longri gildistíð enn tann einstaki uttanlandstúrurin. Hetta verður væntandi skjúttum til fyrimuns.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan. Lógaruppskotið ásetur eins reglur fyri øll, sum ynskja at flyta vápn úr Føroyum og uttan mun til, hvat land vápnið verður flutt til.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Lógaruppskotið  hevur ikki reglur, sum ávirka mannarættindi, og uppskotið er tí í samsvari við EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið  hevur ikki reglur, sum á serligan hátt hava ávirkan fyri einstaklinar, sum bera brek. Uppskotið er tí í samsvari við Brek-sáttmálan.

**2.9. Markaforðingar**
Sambært áður galdandi løgtingslóg og siðvenju er tað so, at flutningur av vápnum úr Føroyum krevur loyvi ella váttan. Hetta hevur við sær, at flutningur av vápnum millum lond ikki er fríur.

Flest onnur lond rundan um okkum, herundir ES-limalond, krevja vanliga í sambandi við innflutning av skotvápnum, at persónurin, sum ynskir at flyta vápnið inn, eisini hevur fingið loyvi at flyta vápnið út úr tí landinum viðkomandi kemur frá. Hetta er m.a. tí, at stórt fokus er á sporføri, tá tað kemur til vápn. Hetta er serliga eftir, at yvirgangsatsóknir hava verið í Evropa við skotvápnum.

Eitt skjal e.tíl. frá einum almennum myndugleika um, at viðkomandi lógliga kann flyta vápn úr Føroyum, er tí ofta ein fyrimunur í sambandi við innflutning til onnur lond.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger heldur ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið hevur við sær, at tað aftur er greið heimild til at krevja, at ein persónur, sum ynskir at flyta vápn úr Føroyum, hevur fingið loyvi til tess.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Við heimild í vápnalógini fer landsstýrismaðurin at áseta nærri reglur um útflutning, undir hesum reglur um útflutningsloyvi við longri gildistíð, sokallað vápnapass.

Tað verður eisini heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til vápnaskránna.

Ætlanin er í fyrstu atløgu, at henda heimild skal verða nýtt soleiðis, at politinum verður heimilað beinleiðis atgongd til vápnaskránna. Hetta hevur við sær, at politiið – innanfyri karmarnar av galdandi reglum um viðgerð av persónupplýsingum – kann fáa beinleiðis atgongd til vápnaskránna í sambandi við útinnan av sínum uppgávum, herundir serliga fyribyrging og eftirkannan av lógarbrotum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð ella annað tilíkt.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Eftir at lógaruppskotið er samtykt, fer Løgmansskrivstovan at broyta kunngerð um vápn v.m. fyri at gera uppgávubýtið á økinum greiðari, soleiðis sum ætlanin var á vári 2019.

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Talan er um eina málsliga broyting í samsvari við rundskrivið um lógarsmíð frá Løgmansskrivstovnuni. Í rundskrivinum er greitt frá, at styttingin “v.m.” ikki eigur at verða nýtt, og at mælt verður til at brúka “og annað”, stytt o.a., ella aðra orðing ella stytting, í staðin.

Innihaldsliga er eingin broyting.

**Til § 1, nr. 2**
§ 1, stk. 3 í galdandi løgtingslóg hevur eitt forboð ímóti at *gera ella evna til* amboð og tilfar, sum tilskilað í § 1, stk. 1 og 2.

Í danska tvítekstinum frá 1969 var hetta orðað *tilvirke og udføre*. Sum greitt frá í almennu viðmerkingunum verður mett, at tað er ein málsligur feilur, at *udføre* er orðað *evna til* í føroysku útgávuni.

Lagt verður upp til, at hetta verður broytt, soleiðis at tað verður ásett í løgtingslógini, at tað er forboðið uttan loyvi frá landsstýrinum at gera ella *flyta út* amboð og tilfar, sum tilskilað í stk. 1 og 2. Mett verður, at tað er týdningarmikið, at vápnalógin eisini fevnir um útflutning av vápnum.

Tá tað verður skotið upp at hava reglur um útflutning av vápnum, fevnir hetta um allan flutning av vápnum úr Føroyum, t.e. bæði tíðaravmarkaðan útflutning, t.d. til eina kapping, ella tíðaróavmarkaðan útflutning, t.d. í sambandi við sølu.

**Til § 1, nr. 3**

§ 1 í vápnalógini ásetur forboð fyri uttan loyvi at flyta inn, útvega sær, hava inni og ganga við skotvápnum o.ø.

Í § 2 í vápnalógini eru ásett undantøk frá forboðnum í § 1. Sambært stk. 1 er bannið í § 1 ikki galdandi fyri:

1. slættpípaðar haglbyrsur og lutir til, um so er at teir bert kunnu nýtast til slættpípaðar haglbyrsur, løddar haglpatrónir við leysum høglum og haraftrat umløðuhettur og hálvløðd ella tóm patrónhylki til haglpatrónir. Luftbyrsur, størri enn kaliber 5,5 mm, og lóður til,
2. luftbyrsur kaliber 5,5 mm og minni, fjaðrabyrsur og lóður til,
3. stikkpatrónir av kaliber ikki yvir 4,5 mm og lóður til við kúluprojektili og patrónlongd ikki yvir 12 mm,
4. sláturamboð, sum bert kunnu nýtast til sláturs og lóður, sum bert kann nýtast til tess.

Tey vápn, sum eru nevnd í § 2, stk. 1 eru sløg av skotvápnum o.ø., sum annars høvdu verið fevnd av forboðnum í § 1, stk. 1. Tí verður mett rættast, at tað í innganginum til § 2, stk. 1 verður víst til § 1, stk. 1 (heldur enn bara til § 1).

Hendan broytingin hevur m.a. við sær, at § 2 ikki ásetur undantak frá forboðnum um at gera og útflyta vápn uttan loyvi, av tí, at hetta er ásett í § 1, stk. 3.

Hetta verður mett at vera í samsvari við siðvenju á økinum.

**Til § 1, nr. 4**
Tað er í dag forboðið persónum, ið ikki hava vápnaprógv, at flyta inn, útvega sær, hava inni ella ganga við skotvápnum, sum eru nevnd í § 1, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 1, nr. 1.

Broytingin hevur við sær, at tað eisini verður forboðið persónum, sum ikki hava vápnaprógv, at flyta út skotvápn fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1 og § 2, stk. 1, nr. 1.

**Til § 1, nr. 5**
Lagt verður upp til, at tað verður ásett í § 4, stk. 1, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um loyvi.

Talan er um eina tekniska broyting av tí at talan er um at fáa greiðari heimild til at áseta tær reglur, sum longu eru ásettar í § 1 í kunngerð um vápn v.m. Tað eru t.d. reglur um, hvar umsókn um loyvi skal sendast inn og hvørjar upplýsingar umsóknin skal innihalda.

**Til § 1, nr. 6**
Lagt verður upp til, at landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nærri reglur um beinleiðis atgongd til vápnaskránna.

Sum greitt frá undir almennu viðmerkingunum omanfyri er tørvur á, at m.a. politiið fær beinleiðis atgongd til vápnaskránna.

Beinleiðis atgongdin broytir ikki, at tað er Umhvørvisstovan, sum er ánari av vápnaskránni og hevur ábyrgdina av, at upplýsingarnar í skránni eru rættar. Heldur ikki broytir ásetingin, at tann myndugleikin, sum fær atgongd til vápnaskránna, skal viðgera upplýsingarnar í tráð við galdandi persónupplýsingarlóggávu. Hetta setur m.a. krøv til trygdina í eini fjaratgongd og

hevur m.a. við sær, at myndugleikin einans kann sláa upp í skránni, tá hetta er neyðugt, og einans kann fáa atgongd til upplýsingar, sum er neyðugar til tess at myndugleikin kann útinna sínar uppgávur.

Fær politiið atgongd til skránna hevur hetta m.a. við sær, at politiið kann sláa upp í skránni, tá hetta er neyðugt til tess at politiið kann handhevja vápnalógina, eins og tað kann vera neyðugt fyri t.d. at fyribyrgja ella eftirkanna lógarbrot.

**Til § 2**
Lagt verður upp til, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð.

Løgmansskrivstovan, 11. september 2020

**Bárður á Steig Nielsen**
Løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælisskriv frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 3: Ummælisskriv frá Føroya Landfúta
Fylgiskjal 4: Ummælisskriv frá Føroya Politistafelag
Fylgiskjal 4a: Ummælisskriv frá Føroya Politistafelag
Fylgiskjal 5: Ummælisskriv frá Skjótisamband Føroya
Fylgiskjal 6: Ummælisskriv frá Sunda Byrsufelag
Fylgiskjal 7: Ummælisskriv frá Veiði- og Skjótifelag Føroya
Fylgiskjal 8: Ummælisskriv frá Búnaðarstovuni
Fylgiskjal 9: Ummælisskriv frá Føroya Kærustovni
Fylgiskjal 10: Ummælisskriv frá Betri
Fylgiskjal 11: Ummælisskriv frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 12: Ummælisskriv frá Fiskimálaráðnum
Fylgiskjal 13: Ummælisskriv frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 14: Ummælisskriv frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 15: Ummælisskriv frá Heilsumálaráðnum